# Finskir dansarar vitjaðu Klaksvíkar Dansifelag

**Hósdagin komu eini fimti finskir dansarar til Klaksvíkar á vitjan hjá Klaksvíkar Dansifelag. Finnararnir eru her í sambandi við dansistevnuna, sum landsfelagið hjá dansifeløgunum í Føroyum, Sláið Ring, skipar fyri. Dansistevnan hevur fingið heitið: Havleik**

DANSUR
*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík:** Dansararnir komu til Klaksvíkar hósmorgunin klokkan tíggju. Tey fóru beint í ein buss og so ein túr til Viðareiðis. Alex Sólstein var ferðaleiðari og hann greiddi dúgliga finnunum frá ymiskum søguligum í sambandi við støð, sum tey vitjaðu. Millum annað vóru tey í Viðareiðis kirkju, har tey sóu alt kirkjusilvurið.

Eftir vitjanina á Viðareiði varð farið aftur til Klaksvíkar og niðan í Skálan, sum eru hølini hjá Klaksvíkar Dansifelag, at eta matpakka. Síðani skiftu tey klæðir og so gekk leiðin í Christianskirkjuna, áðrenn tey fóru norður á Nólsoyar Pálsgøtu at hava eina lítla dansiframsýning fyri norðoyingum.

Tey dansaðu á parkeringsøkinum norðanfyri bakaríið hjá Símun og heilt fitt av fólki steðgaði á at hyggja eftir hesum dansinum, sum at síggja til tyktist so leikandi lættur, men óivað ikki var tað kortini.

Dansiframsýningin vardi ikki longi, men fólkini, sum vóru savnað til at hyggja, sóu út til at hugna sær í góðveðrinum kortini. Nógv høvdu nýtt høvi til at fara út við børnunum og høvdu keypt ís. So tað var rættuligur summardámur yvir løtuni.

Eftir dansiframsýningina fóru dansararnir niðan aftur í Skálan, har tey fingu at eta. Og síðani fóru tey avstað aftur klokkan sjey.

Heini Mohr, formaður í Klaksvíkar Dansifelag, sigur, at tey lótu væl at vitjanini, og tey søgdu, at tey høvdu fingið eina positiva mynd av Norðoyggjum.

### Havleik

Dansararnir eru í Føroyum í sambandi við at Landsfelagið fyri dansifeløgini í Føroyum, Sláið Ring, skipar fyri eini dansistevnu, sum tey hava valt at kalla fyri Havleik. Hetta er tann fyrsta av sínum slagi í Føroyum. Umleið 400 dansarar úr øllum Norðurlondunum eru í Føroyum í hesum sambandinum.

Tílíkar dansistevnur hava verið í Íslandi eisini, og har eita tær Ísleik, og so varð hildið, at tað var so upplagt at kalla ta føroysku dansistevnuna fyri Havleik.

Dansistevnan gongur fyri seg í Havn, men hósdagurin varð so nýttur til at fara í onkrar av hinum oyggjunum at vitja. Og finnararnir komu so til Klaksvíkar, meðan onkrir av hinum dansarunum fóru aðrastaðni í landinum at vitja.

Heini Mohr, formaður í Klaksvíkar Dansifelag sigur annars, at tað gongur væl hjá føroyska dansinum fyri tíðina.

- Hóast tað tyktist sum um limir í okkara dansifelag ikki tóku so væl undir við Havleik, so eru vit kortini aktiv. Næsta vikuskiftið verður dansinátt í Norðurlandahúsinum og í ár eru tað so vit, sum skulu skipa fyri, sigur Heini og leggur at enda aftur at, at Klaksvíkar Dansifelag eitt kvøldið í hesi vikuni dansaði fyri portugisiskum gestum hjá Kósini, sum vóru til døgurða í Skálanum.

- Tey vildu so fegin sleppa at síggja tann føroyska dansin, og tað sluppu tey so eisini.



*Tríggir tónleikarar spældu undir, meðan dansararnir sýndu fram finskan fólkadans í Klaksvík seinnapartin hósdagin*

# Tónleikur og sjónleikur í Mentarhúsinum

**Fuglfirðingar fara at spæla varmakelduteitið í Mentanarhúsinum, og um vikuskiftið verður eisini dansur við bólkum og plátuvendara**



Um vikuskiftið er varmakeldustevna, og fleiri tiltøk eru á skránni hjá nýggja Mentanarhúsinum í Fuglafirði.

Fríggjakvøldið var Varmakelduteitið sýnt, og tað verður tað aftur sunnukvøldið og mánakvøldið. Tað eru fuglfirðingar sum spæla, og ein partur av skemtinum er lokalt. Millum annað hava tey gjørt eina parodi upp á kenda vísusangaran Niels Midjord. Tað eru eisini aðrar vísur, sum Mortan G. Berjastein hevur skrivað, á skránni.

Í gjárkvøldið var so diskotek við Jan Gardar.

Leygardagin er café í húsinum, og tá kunnu fólk vitja inn og hyggja eftir húsunum.

Leygarkvøldið verður barnatiltak við Angelu, Bobo og Fjotto, og eftir midnáttarsamkomuna verður dansur við bólkinum Driv.

Sunnudagin er aftur café í Mentanarhúsinum, og kvøldið verður rundað av við dansi, har Jens Marni Band fer at spæla.

# ítróttur

Nr. 127 • leygardagur • 6. juli 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

# Marcello farin til hús


*Brasiliumaðurin Marcello verður ikki á síggja á B68 liðnum restina av árinum*
Mynd: Savnsmynd

**HB spælararnir hava sagt nei takk til tilboðið um tvær vikur summarfrí – teir fara at venja aftur um eina viku**

HB–B68
*Jóannes Hansen*

Støðutalvan sigur, at talan er um toppdyst, tá HB í morgin fær vitjan av B68. HB er tvey stig frammanfyri B68, sum við sigri kann troðka havnarmenninar av tindinum, sum teir hava verið á alt kappingarárið.

Á Toftum ásanna teir, at tað verður torført at røkka ynskidreyminum. Bæði tí at HB hevur eitt gott lið, sum higartil í ár hevur víst seg at vera sera sannførandi á heimavølli, og tí at fyritreytirnar hjá B68 ikki eru av teimum bestu. Tað setur síni spor at luttaka í altjóða kapping og samstundis røkja skyldurnar heima á landi í landskappingini og steypakappingini.

– Men spælararnir vita, hvat tað snýr seg um. Skal møguleikin fyri at fáa HB aftur varðveitast, so verður neyðugt at fáa stig í Gundadali. Við sigrinum mikukvøldið fóru vit framum trý lið. Um tað ikki gongur okkum til vildar í morgin, so er møguleikin góður fyri, at KÍ, NSÍ og GÍ fara framum okkum aftur, heldur Niclas Davidsen, formaður í B68.

Hjá B68 er Morten Skytte, sum spældi fyrsta tíman ímóti Skála, farin av landinum aftur. Anders Nygaard verður ivaleyst við frá fyrsta bríksli í morgin. Eingin spælari er skaddur, og eingin er leikbannaður. Men Marcello Marcellino verður ikki við. Hann fer í dag til Brasilia, og hann kemur ikki aftur:

– Tað er rætt, at Marcello rýmir frá okkum. Hann hevur verið nógv skaddur í ár, men nú var hann komin fyri seg. Í vikuni bað hann um at sleppa til hús, og tað fer hann so, sigur Niclas Davidsen.

Marcello skoraði átta mál í landskappingini í 1999, sum var fyrsta árið hjá honum á Toftum. Besta árið var í 2000, tá hann skoraði fimtan ferðir. Í fjør var hann skaðaplágaður fyrsta partin av kappingini. Hann spældi við í fjúrtan dystum, men bara í seks frá fyrsta bríksli. Úrtøkan var fimm mál.

### Skerja frítíðina niður í helvt

HB er væl fyri, nú teir skulu verja oddastøðuna í Gundadali. Burtursæð frá Una Arge, sum ikki hevur verið við í nógvar vikur, eru allir spælararnir tøkir. Eingin er leikbannaður, og eingin er skaddur.

Tá dysturin ímóti B68 verður liðugt spældur, fara HB hugsanirnar at snúgva seg um steypafinaluna á ólavsøku.

– Okkum stóð í boði at halda frí tvær tær næstu vikurnar, men spælararnir hildu, at tað var ikki ráðiligt at halda frí so leingi. Tí fara vit at venja aftur, tá næsta vika er liðug, sigur liðformaðurin hjá HB, Rúni Nolsøe.

Á Toftum hava teir gjørt av, at teir skulu bara hava summarfrí í eina viku.

# Heðin venur aftur

**Men hann verður ikki á KÍ liðnum ímóti Skála, sum framvegis eigur fyrsta sigurin til góða**

SKÁLA–KÍ
*Jóannes Hansen*

Eftir at Skála fyri fyrstu ferð hevur spælt ímóti øllum hinum liðunum í bestu deildini, eiga teir framvegis fyrsta sigurin til góða. Men hóast tað ikki hevur roynst nakað serligt, so hava skálamenn ikki mist mótið. Teir harmast um, at tað ikki eydnaðist at fáa stig ímóti B68 og vóna, at tað skal ganga betur ímóti KÍ:

– Hýrurin er góður, og vit fara at royna at gera alt, sum tað ber okkum til, fyri at fáa eitt gott úrslit. Tað verður torført, tí tað hevur gingið væl hjá KÍ seinastu vikurnar, men vit fara at royna, sigur Pauli Poulsen, sum er miðverji á Skála.

Umframt teir, sum vóru við mikukvøldið, er Rúni Rasmussen tøkur aftur. Hann var leikbannaður ímóti B68. Nú er tað staðfest, at eitt bein er brotið í fótinum á Kára Nielsen, sum tískil heldur ikki fer at fáa vant næstu vikurnar.

### Heðin aftur á vøllinum

Heðin á Lakjuni hevur ikki spælt síðstu seks vikurnar, tí eitt bein hevur verið brotið í fótinum. Nú er skaðin burtur. Heðin á Lakjuni vandi aftur hóskvøldið. Tað er kortini sera ivasamt, um hann verður við í morgin. Tá vit fræuttu úr Klaksvík í gjár, roknaðu teir ikki við, at Heðin fer at spæla.

Liðformaðurin hjá KÍ, Jan Joensen, er leikbannaður í morgin. Ove Nysted hevur verið knæskaddur, men hann vandi aftur hóskvøldið. Um hann verður í miðverjuni, so verður Allan Joensen fluttur fram aftur á miðvøllin. Í Runavík var Allan í miðverjuni.

– Skulu vit vera við, har tað gongur fyri seg, so mugu vit vinna í morgin. Tað verður torført, men vit kenna treytirnar, sigur Harley Bertholdsen, sum hevur verið væl fyri síðstu vikurnar.

Harley og hinir klaksvíkingarnir hava sjálvandi áhuga í, hvussu tað fer at gangast í Gundadali í morgin. Ynskidreymarnir hjá KÍ eru, at teir vinna á Skála, og at HB samstundis ikki fær fulla úrtøku ímóti B68.

Um ynskini gerast til veruleika, so verður talan um toppdyst, tá HB í fyrsta umfarinum eftir summarsteðgin skal til Klaksvíkar.

KÍ spælararnir hava frí í tvær vikur, men teir hava eina renniætlan við sær í summarfrí!


*Eftir beinbrot, er skjóti framherjin Heðin á Lakjuni farin aftur at venja*
Mynd: Savnsmynd

## Nógvir eygleiðarar á staðnum

**Í hvussu so er venjararnir hjá fimm feløgum fylgdu við, tá Skála og B68 tókust í summarkuldanum á Skála**

EYGLEIÐARAR
*Jóannes Hansen*

Sum alla aðra staðni, so var tað bítandi kalt á Skála mikukvøldið. Hóast tað var 3. juli, so tóktist tað, sum um at høgu fjøllini í Eysturoy høvdu hug at grána.

Men hóast kuldan, so vóru ikki so fáir áskoðarar á Skála, og millum hesar vóru nógvir, sum hava við onnur fótbóltsfeløg enn tey bæði, sum vóru á vøllinum, at gera.

Um venjararnir hjá VB, TB og B36 vóru har, duga vit ikki at siga. Vit løgdu teir ikki til merkis, men allir hinir vóru har. Tí hevði tað verið lag á manni at havt fund í felagnum fyri venjarar, tá dysturin var lokin!

Kurt Mørkøre, venjari, og Dánial Jákup Joensen, hjálparvenjari hjá KÍ, vóru millum áskoðararnar. Tað var ikki so undarligt, tí longu nú sunnudagin skal KÍ spæla á Skála, har teir ikki stóðu seg so væl í steypakappingini.

Ion Geolgau, HB venjarin, var eisini á Skála. Hann mundi serliga hava eyðuni eftir B68. Komandi sunnudag fær HB vitjan av B68, og talan er um rættuliga týdningarmiklan dyst. HB er á odda í 1. deild, men teir eru bara tvey stig undan B68.

Trygvi Mortensen, venjari hjá EB/Streymi, var eisini á Skála. Hansara lið fer 11. august at fáa vitjan av B68.

Jógvan Martin Olsen, venjari, og Bill Jacobsen, hjálparvenjari hjá NSÍ, vóru á Skála, og tað var Johan Nielsen, venjari hjá GÍ, eisini. GÍ skal spæla á Skála 11. august, meðan NSÍ ikki skal yvir á Skála fyrrrenn 1. september. Men tað ræður um at vera væl fyrireikaður.